## Amerikonsku stafettirnar úti

USA eigur ikki umboðan í nakrari av stafettini í 4X100 metra renning. Hetta er annars vanliga ein av greinunum, har USA er mest sum einaráðandi, men í hálvfinalunum í gjár gekk galið hjá bæði monnum og kvinnum. Fyrst kiksaði hjá monnunum, har Tyson Gay ikki fekk fatur á stafettini, tá hann skuldi renna seinasta teinin. Og hjá kvinnunum eydnaðist ikki Lauryn Williams at fáa fatur á stafettini í seinasta skiftinum.



## Podolski breyt rivjabein

Tað líktist eini kloning av ørskapstacklingini hjá týska Schumacher móti franska Battston í HM-kappingini í ’82. Ta ferðina breyt Battiston nakkan, men tíbetur gekk ikki heilt so galið hjá Lukas Podolski mikukvøldið. Talan var at kalla um karate-spark, sum hann fekk frá belgiska málverjanum, Stijn Stijnens, tá hesin kom rennandi út úr brotsteiginum í vinardystinum landanna millum, og fótbóltsáskoðarar kring heimin standa púra spyrjandi, tí einki kort varð givið fyri tilburðin. Tíbetur slapp Podolski tó við einum brotnum rivjabeini eftir tacklingina, sum alt fyri eitt fann sær veg til Youtube.

B68-NSÍ:

# Tað verður krút í grannauppgerðini

**Tað eru fleiri ár síðani, at fyritreytirnar fyri tættari uppgerð á vestara armi av Skálafjørðinum hava verið so góðar, sum tær nú tykjast at vera**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Munurin millum grannarnar, B68 og NSÍ, tykist vera minni í ár, enn hann hevur verið seinnu árini*

Tað verður grannauppgerð á Svangaskarði sunnudagin. NSÍ skal út at vitja B68, og soleiðis sum gongdin hevur verið tær seinastu ferðirnar, so er lagt upp til tættari stríð, enn tað hevur verið fleiri av undanfarnu árunum, tá ið NSÍ hevur vitjað á Svangaskarði.

Inntil miðskeiðis í níti árunum var tað NSÍ, sum ferðaðist upp og niður millum tvær tær ovastu deildirnar. Í hesi øldini hava teir í Runavík átt fast pláss í fremstu røð, meðan toftamenn hava verið eitt sindur ódrúgvari.

At tað ikki hevur hilnast so væl hjá B68 hevur sæst aftur í úrslitunum á heimavølli ímóti grannunum hesar seinastu ferðirnar. Í fjør var B68 í næstbestu deildini, í 2006 vann NSÍ 5-1 á Svangaskarði, í 2005 var B68 í næstbestu deildini, og í 2004 vann NSÍ 5-0 á Svangaskarði. Tá ið NSÍ í 2. umfari 19. apríl í ár vann 2-0 á Svangaskarði var úrslitið, sum tað varð roknað við.

Seinasti B68 heimasigurin ímóti NSÍ er fimm ára gamal. Í 2003 vann B68 3-2. Síðani hevur NSÍ verið omaná, men soleiðis sum úrslitini hava lagað seg seinastu ferðirnar, so kundu tey bent á, at tað hesa ferð verður torførari hjá meistarunum at tryggja sær øll stigini, enn tað hevur verið seinastu ferðirnar, tá ið teir hava vitjað á Toftum.

Burturúr teimum trimum umførunum síðani summarsteðgin hevur B68 úrtøkan verið níggju stig, og hjá NSÍ hevur hon verið eitt stig! Hetta er avgjørt ikki í tráð við tað, sum tað frammanundan varð roknað við. Á støðutalvuni er munurin millum hesi bæði feløgini farin at tódna, og nú fæst at síggja, um gongdin fer at síggjast aftur í grannauppgerðini.

Hjá NSÍ er miðverjin og liðformaðurin Óli Hansen tøkur aftur eftir leikbann. Jóhan Troest Davidsen, Jónas Þór Næs og Bogi Løkin hava verið burturstaddir í landsliðsørindum í vikuni. Teir fara at venja saman við liðfeløgunum í kvøld.

Eingin B68 spælari hevur verið í Portugal. Tað er greitt, at Pól Jóhannes Justinussen, sum hevur verið sera stinnur miðverji, síðani hann flutti úr NSÍ og til B68, ikki fer at spæla sunnudagin, og at heldur ikki Jann Martin Mortensen fer at spæla. Teir eru ikki skaddir, og teir eru ikki leikbannaðir, men feløgini hava í sambandi við flytingina avrátt, at teir ikki skulu spæla ímóti sínum gamla felag.

Senegalesiski miðverjin Landing er um at vera tøkur aftur hjá B68. Hann breyt seg sundur heilt tíðliga í kappingarárinum, og hevur síðani tá ikki verið førur fyri at spæla.

ÍF-Víkingur:

# Víkingar við luksus trupulleika

**Í Fuglafirði er neyðugt við nýggjum málverja, nú liðformaðurin er leikbannaður**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fyri fyrstu ferð nakrantíð fer Víkingur sunnudagin at spæla landskappingardyst í Fuglafirði. ÍF hevur tvær ferðir fyrr í ár vitjað í Sarpugerði. Fyrru ferðina vunnu væl uppløgdu fuglfirðingarnir 1-0, og seinnu ferðina vann heimaliðið 2-0.

ÍF hevur einki stig fingið burturúr síðani summarsteðgin, og tá ið tapini hava verið ímóti B68, B71 og Skála, so hava tey borið við sær, at fuglfirðingar eru meiri kroystir nú, enn teir hava verið fyrr í summar.

Hjá Víkingi hevur tað leingi hilnast rættuliga væl. Skoðsmálið eftir fyrsta partin av kappingini var, at Víkingur tapti aðru hvørja ferð. Soleiðis er tað ikki longur. Seks tær seinastu ferðirnar eru víkingarnir farnir av vølli við úrtøku, og góða gongdin hevur borið við sær, at yngsta felagið í bestu deildini nú stríðist fyri at vinna heiðursmerkir.

Manningarliga støðan er góð í Sarpugerði. Teir eru 19-20 til venjingar, og tað er vorðið luksus trupulleiki hjá Antoni Skoradal og Magna Jarnskor at gera av, hvørjir skulu sita á beinkinum og hvørjir skulu hjálpa til í 1. deild, har tað eisini hevur gingið væl.

Í Klaksvík var Geza Turi plágaður av haldi í rygginum. Málverjin vandi aftur mikukvøldið, og hann verður heilt víst ímillum stólparnar, tá ið Víkingur fer at vitja í Fuglafirði.

Í Fuglafirði eru Áki Petersen og Jonn Thomsen tøkir aftur, eftir at teir hava sitið skaddir uttanfyri. Andras Gango sá reytt síðsta sunnudag á Sandi, og hann er leikbannaður ímóti Víkingi. Tá ið Albert Ellefsen fyri fyrstu ferð verður ábyrgdarmaður fyri ÍF í Fuglafirði, verður nýggjur maður ímillum ÍF stólparnar. Tað verður Rógvi Ryggshamar, sum loysti av, tá ið Andras Gango fór av vøllinum á Sandi.

## Dystaryvirlit

**Formula-deildin**

| Dagur | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 24.08 | ÍF-Víkingur | Lars Müller |
| 24.08 | KÍ-HB | Dagfinn Olsen |
| 24.08 | B71-EB/S | Georg Rasmussen |
| 24.08 | B36-Skála | Rúni Gaardbo |
| 24.08 | B68-NSÍ | Petur Reinert |

**1. deild**

| | | |
|---|---|---|
| 23.08 | AB-EB/S | Rói Jacobsen |
| 23.08 | TB-B68 | Bárður Mortensen |
| 23.08 | 07 Vestur-KÍ | Andrew Christiansen |
| 23.08 | Víkingur-HB | Birgir Sondum |
| 24.08 | NSÍ-VB/S | Alex Troleis |

**2. deild**

| | | |
|---|---|---|
| 23.08 | TB-Víkingue | BiBi |
| 24.08 | AB-Fram | B71 |
| 24.08 | MB-KÍ | 07 Vestur |
| 24.08 | Skála-ÍF | Vinjard Dam |
| 24.08 | 07 Vestur-B36 | MB |

**Kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 24.08 | AB-Víkingur | Johan P. Michelsen |
| 24.08 | Skála-B36 | Sunniva Vesturtún |
| 24.08 | VB/S-KÍ | TB |